# Meist-ararnir úti

Við einum 3-1 sigri á Porto syrgdi Inter fyri, at verjandi meistararnir ikki longur eru partur av Champions League

Eftir 1-1 í fyrra dystinum, stóð greitt, at tað var Inter, sum hevði betru kortini á hondini undan dystinum á San Siro í kvøld.

Stóra hetjan í dystinum í týskvøldið var brasilianski Adriano. Hann skeyt øll trý málini hjá Inter. Jorge Costa minkaði annars til 2-1 í seinna hálvleiki, men eftir triðja málið frá Adriano - tríggjar minuttir fyri leiklok - var eingin ivi um endaliga vinnaran.

**jm**

# Minstu-krøv

Í fjør setti Fótbóltssamband Føroya í verk loyvisskipanina hjá UEFA fyri feløgini í fremstu deildini í Føroyum. Í ár eru krøvini til feløgini í 1. deild herd nakað, og samstundis eru minstukrøvini eisini farin at galda fyri feløgini í næstfremstu deildini.

### Grønt ljós til øll

Minstukrøvini snúgva seg í høvuðsheitinum um, at feløgini lúka nakrar treytir á ítróttarliga-, rættarliga-, fíggjarliga-, infrastrukturella- og starvsfólkaøkinum.

Feløgini sendur inn síni próvskjøl síðst í farna mánað, og síðani tá hevur umsitingin hjá FSF kannað eftir, um øll próvskjølini vóru í lagi. Tá ið hetta var gjørt, var tilfarið sent víðari til óheftu 3-manna loyvisnevndina hjá FSF, sum gevur endaligu tilsøgnina um loyvi til at taka lut í ávíkavist 1. og 2. deild, umframt kappingum hjá UEFA í 2005.

**tn**

# Fartelefonruðuleiki á oyggjaleikunum

**Tá ið oyggjaleikirnir verða í Hetlandi seinni í ár, er ikki óhugsandi, at reinur ruðuleiki verður á fartelefonøkinum**

OYGGJALEIKIR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Í summar verða oyggjaleikirnir í Hetlandi. Talan verður um størsta einstaka tiltakið nakrantíð í Hetlandi, og hetta fer óivað at seta eitt veldugt trýst á avmarkaða fartelefonnetið í oyggjunum.



*Tá ið oyggjaleikirnir verða í Hetlandi í summar, kann væntast sannur fartelefon ruðuleiki, tí netið hjá hetlendingum hevur bert rúm fyri 90 samrøðum samstundis.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Bert 90 samrøður samstundis

Núverandi fartelefonnet í Hetlandi er ógvuliga avmarkað, og netið rúmar einans 90 samrøður samstundis. Hetta hevur við sær, at tað er púra vanligt í Hetlandi, at eitt nú á nýggjárinum og beint eftir skúlatíð gerandisdagar kann tað verða trupult at fáa tóna, tá ið ein skal ringja við fartelefonini.

Havandi í huga at tað koma okkurt um 3.000 íðkarar og áskoðarar til Hetlands í sambandi við oyggjaleikirnar, sum flestøll óivað hava fartelefon við sær, er ikki torført at ímynda sær, at talan kann gerast um rættuligan fartelefon ruðuleika, meðan leikirnir eru.

Hetlendsku myndugleikarnir siga við Shetland News, at arbeitt verður við at loysa trupulleikan, og stóra telefyritøkan Vodafone er farin at kanna, um tað kann loysa seg hjá teimum at gera eina fyribilsloysn, sum økir um kapasitetin á hetlendska fartelefonnetinum, meðan oyggjaleikirnir eru.

Fyrireikararnir av oyggjaleikunum í Hetlandi siga tó, at væntandi fartelefon-kapasiteturin ikki fer at hava nakra ávirkan á leikirnar sum so, tí tað mesta av samskiftinum í sambandi við kappingar fer fram umvegis walkietalkie ella fastnettelefon.

# Leikirnir í 2009 verða helst á Ynys Mon

Í sambandi við fundin hjá aðalstjórnini í oyggjaleikafelagsskapinum IGA í Hebridunum herfyri var umrøtt, hvar leikirnir skulu verða í 2009.

Bæði Áland og Ynys Mon hava ligið framvið at fáa leikirnar, men valið fellur helst á bretsku oynna Ynys Mon. Avgerðin um vertsskapin í 2009 fellur tó ikki enn, tí tað endalig støða til málið verður ikki tikin fyrr enn á aðalfundinum í IGA, sum verður í sambandi við leikirnar í Hetlandi í summar.

Formaðurin í IGA, Bo Frykenstam, sigur tó við Shetland News, at aðalstjórnin í IGA er av teirri sannføring, at høvuðsendamálini hjá oyggjaleikafelagsskapinum verða best gingin á møti, um leikirnir í 2009 verða á Ynys Mon. Tí fer aðalstjórnin í IGA helst at mæla til, at Ynys Mon verður vertur fyri leikunum um fýra ár.

**tn**

*Tað verður allarhelst á Ynys Mon, at Bogi Lenvig og onnur føroysk ítróttarfólk skulu royna seg á oyggjaleikunum í 2009*
*Mynd: Álvur Haraldsen*



# Menorca verður síðsti limurin

**Alt bendir á, at spanska oyggin Menorca verður síðsti limurin í IGA, sum er felagsskapurin aftan fyri oyggjaleikirnar**

OYGGJALEIKIR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Herfyri hevði aðalstjórnin í IGA fund í Hebridunum, og har var ein umsókn frá Menorca um limaskap í IGA viðgjørd, og aðalstjórnin tóktist sinnað at ganga umsóknini á møti.

### Síðsti limurin

Menorca er ein kend frítíðaroyggj, og er nærmasti granni hjá navnframa frítíðarparadísinum Mallorca, sum flestøll kenna.

Tá ið IGA hevur sín aðalfund í sambandi við oyggjaleikirnar í Hetlandi í summar, verður endalig støða tikið til, um Menorca skal innlimast í IGA.

Um so er, at Menorca verður innlimað í oyggjaleikafelagsskapin, so er spanska oyggin samstundis seinasta oyggjasamfelagið, ið verður innlimað í IGA. Tað er nevnliga so, at ein samtykt hjá IGA sigur, at tað í mesta lagi er rúm fyri 25 limum í IGA, og Menorca verður limur nummar 25, um oyggin verður innlimað.

Hetta var samtykt fyri at avmarka leikirnar, tí um so er, at limatalið verður óavmarkað, fer luttakaratalið eisini at vaksa óavmarkað, og tað hevði havt við sær, at færri og færri av oyggjasamfeløgunum høvdu havt møguleika fyri at verið vertir fyri leikunum.